# Málningaframsýning á páskum

Lions Club Eysturoy skipar fyri árligu málningaframsýningini

**1. og 2. páskadag í Runavíkar skúla**

Opið verður báðar dagarnar fra kl. 15 til 20. Kostnaður 40 kr.

Atgongumerki (myndaskáin) er samstundis lutaseðil uppá ein málning. Annars verða lutaseðlar uppá málningin seldir báðar dagarnar.

Framsýningin verður sett 1. páskadag kl. 15 av Petur Martin Petersen, Fuglafjørð.

Innkomni peningurin fer til góðgerandi endamál.

(Framsýningin er ikki sensurerað. Fólkið og eftirtíðin metir um stílvirði)

**Lions Club Eysturoy**

# Søkt verður eftir fólki

til bygdarhúsið á Strondum at byrja sum skjótast.

Tann, ið settur verður, skal taka sær av rakstrinum av húsinum, m.a. matstovuni, reingerð og útleigan av hølum.

Løn samb. avtalu.

Møguligar umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2005

Kommustýrið tilskilar sær rætt til at velja millum umsøkjarnar ella ongan at seta.

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10**
**490 Strendur**

# Lærupláss til Kvik køkar

Vit søkja eftir einum handilslærlingi.

Skal helst hava FHS ella HH, men eingin treyt.

Vilt tú vita meir um lærupláss, so ring 312480 ella 512480.

Skrivlig umsókn við ummælum skal sendast til

kvik

**Kvik køkssentrið**
Hoyvíksvegur 65
Box 3182
100 Tórshavn

# Vit sóknast eftir goymslulærlingi

**Uppgávurnar umfata í høvuðsheitinum:**
Goymslustýring, viðlíkahald av goymslu og útgerð, útkoyring, bílegging av vørum umframt aðrar uppgávur.

Fyrimunur er um tú hevur royndir innan goymslu umframt áhuga og kennir til maskinur. Neyðugt er, at tú er álítandi, røkin og **arbeiðir sjálvstøðugt**.

Koyrikort til bil er neyðugt.

Hevur tú hug at royna teg, so send okkum eina skrivliga umsókn við møguligum viðmælum og prógvum.

**Kaj Andreasen & Co**

Heilsøla, smásøla & umboð
Brekkutún 7
Postboks 1200
FO-188 Hoyvík

# PASS

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram í Danmark og er passavgreiðslutíðin umleið 2 til 3 vikur.**

**Vinarliga biðið tí um passið í góðari tíð**

Umsókn um pass fæst á Fútaskrivstovuni, Smyrilsvegi 20, Tórshavn, á hemasíðuni www.politi.fo og á øllum politistøðum uttanfyri Tórshavn.

Umsóknin kann latast inn við at venda sær persónliga til Fútaskrivstovuna í Tórshavn ella til eina av politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

**Skjøl at hava við, tá pass verður umbiðið:**
Gamla passið
Dóps-, føði- ella navnaseðil og møguligt vígslubræv
Nýggja mynd støðd 35x45 mm

**Passið skal gjaldast, tá tað verður umbiðið:**

| | |
|---|---|
| Pers. millum 18 og 67 ár | kr. 400,- |
| Pers. yngri enn 18 ár | kr. 115,- |
| Pers. sum eru fyltir 67 ár | kr. 150,- |

*Gjørt verður vart við, at eftir 1. oktober 2004 kunnu børn, sum eru undir 15 ár, ikki longur verða innskrivað í pass hjá foreldrunum ella øðrum, og skulu tí hava egið pass.*

**Nærri fæst at vita við at venda sær til Fútaskrivstovuna tel. 35 14 48 ella politistøðirnar.**

FØROYA LANDFÚTI
*tann 17. mars 2005*

**M. Nepper-Christensen**

Sosialurin

# Almannastovan

# Skrivstovufulltrúi á Almannastovuni

Hevur tú hug at royna tíni evni í einari organisatión í støðugari menning? So er hetta kanska nakað fyri teg. Eitt fulltíðarstarv sum skrivstovufulltrúi við tænastu á Veitingardeildini á Almannastovni er leyst at seta pr. 16. apríl 2005.

**Um deildina:**
Á Veitingardeildini í Tórshavn arbeiða í løtuni 11 starvsfólk. Økið hjá deildini eru allar lógarbundnar veitingar. Tær eru pensjón, stuðul til uppihaldspening, dag- og barnapening.

**Arbeiðs- og ábyrdarøki:**
- Pensjónsmál - eftirlit og ávísing
- Dag- og barnapengamál - eftirlit og ávísing
- Uppihaldspeningur - eftirlit og ávísing
- Eftirlit við langtíðar veitingum frá almannamiðstøðunum
- Ráð og vegleiðing til málsviðgerar á deildini
- Upplæring av nýggjum starvsfólkum
- Lóggáva - at menna EDV-kervið til nýggja lóggávu
- Hagtøl
- Samskifta við aðrar partar av Almannastovuni
- Aðrar uppgávur

**Útbúgving:**
Skrivstovuútbúgving, merkonom ella onnur viðkomandi útbúgving.

**Førleikakrøv:**
Góðan kunnleika til KT og Office forritini
Gáðan málburð bæði munnliga og skrivliga
Góð samstarvsevni
Sjálvstøðug/-ur
Evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt
Dámar væl avbjóðingar og er ágrýtin

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Byrjunarlønin er í lønarbólki 4.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tummas Djurhuus, deildarleiðara á Veitingardeildini tlf. 353510.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn í hendi **innan 31. mars 2005 kl. 12:00.**

**Um Almannastovuna**

*Fyri at betra um tænastustøði hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa léttari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeningaog forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir.*